## Fróðskaparsetur Føroya
## University of the Faroe Islands

**Søgu- ogsamfelagsdeildin**
**Faculty of History and Social Sciences**

# Skeiðslýsing:
# Sosialvísind og Samfelagsplanlegging, praksisskeið 1; (Heyst 2018)

# Course Description:
## Social Analysis and Planning, Practical Course1; (2018)

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar / Course number** | 2665.15 |
| **Heiti / Title** | Praksis skeið - Skipanarlóg í verki<br><br>Practical course - Planning Law in Practice |
| **ECTS námsstig / ECTS** | 2,5 ECTS. |
| **Fortreytir / Prerequisites** | Grundstøði í samfelagsvísindi (2 ár) ella samsvarandi kvalifikasjónir.<br><br>*Students must have completed the required core courses at the Department of History and Social Science (2 years), or have equivalent qualifications.* |
| **Stig / Level** | Bachelor. Kravskeið á triðja ári í Sosialvísind og Samfelagsplanlegging<br><br>*Bachelor. Required course third year in Social Analysis and planning.* |
| **Endamál / Purpose** | At geva teimum lesandi innføring í tættir í lóggávu um skipan og ætlanir í lóggávu um forsorg, býarskipan, bygging og náttúrufriðing. Út frá veruligum ella hugsaðum dømi um broyting av skipan ella ætlan (t.d. býarskipan ella raðfesting á sosiala økinum), læra at meta um framferð hjá myndugleika, viðkomandi hoyring og rættindum hjá borgarum og harvið læra, hvussu samfelagsplanlegging fer fram í verki.<br><br>*To provide students with an introduction to elements of systems and planning law in the legislation governing social care, urban planning, construction and environmental conservation. Based on real or fictional cases of systemic or planning changes (e.g. urban* |

| | |
|---|---|
| | *planning or social sector prioritization), to learn to assess how authorities approach these, relevant hearings and citizens' rights, and thereby learn how social planning is put into practice.* |
| **Innihald / Content** | Tættir í formligari og sakligari fyrisiting, skipað við innføring í ymsa skipanarlóg, har tey lesandi fyrst fáa innlit í viðkomandi ásetingar. Seks dagar vera við frálæru (dupulttíma hvønn dag) og bólkaarbeiði. Síðani verða tveir dagar, har tey lesandi verða býtt í bólkar at umboða ymisk sjónarmið hjá myndugleikum og borgarum umframt at virka sum trætustovnur.<br><br>*Aspects of formal and factual administration, conveyed with introductions to different areas of planning law, which offers students initial insight into the relevant legal provision. The sessions will take place over six days (two-hours each day) and there will be group work. Then, over two days, students will be divided into groups representing conflicting views of authorities and citizens, as well as acting as mediators.* |
| **Læru-ogundirvísingarhættir / Learning and teaching approaches** | Skeiðið verður skipað við frálæru (seks dupulttímum), vegleiðing umvegis teldukervi (Moodle), kjaki og røð av fundum í trætustovni, har partarnir leggja fram sjónarmið, taka ávegis avgerðir um mannagongd og orða úrskurð.<br><br>*The course will be arranged with lecturing (six two-hour sessions), online guidance (Moodle), discussions and a series of arbitrations where the parties present their views, make decisions regarding procedure and formulate a ruling.* |
| **Læruúrtøka / Learning outcomes** | Við skeiðsenda dugir tann lesandi:<br><br>✓ at sýna innlit í hvussu samfelagsplanlegging fer fram eftir lóg;<br>✓ at sýna innlit í heimildir hjá myndugleika at broyta ætlanir og skipanir;<br>✓ at sýna innlit í mannagongdir í broyting; |

| | |
|---|---|
| | ✓ at sýna innlit í rættindi borgaranna tá ið lagdar verða ætlanir og skipanir;<br>✓ at sýna innlit í tvørgangandi heimildir hjá øðrum myndugleikum;<br>✓ at sýna innlit í viðkomandi ásetingar í fyrisitingarlógum;<br>✓ at sýna innlit í kæruviðgerð;<br>✓ at velja út mest viðkomandi skjøl og sjónarmið at leggja fram innan givnar karmar;<br>✓ at greina rættarstøðuna í ritum og úrskurðum í kærutilgongd.<br><br>*Successful students can demonstrate ability to:*<br><br>✓ *demonstrate insight into how social planning is governed by law;*<br>✓ *demonstrate insight into the competences public authorities have to change plans and systems;*<br>✓ *demonstrate insight into the procedures applicable when changes are sought;*<br>✓ *demonstrate insight into citizens' rights when plans are made or systems established;*<br>✓ *demonstrate insight into the crosscutting competences of other authorities;*<br>✓ *demonstrate insight into relevant provisions in administrative law;*<br>✓ *demonstrate insight into how appeals are processed;*<br>✓ *select the most relevant documents and perspectives to present within a set framework;*<br>✓ *analyse the legal situation in documents and rulings in appeals procedures.* |
| **Próvtøkuháttur /**<br>**Assessment methods** | 80% uppmøting kravd. Próvtøkan er skrivlig uppgáva. |

| | |
|---|---|
| | *80% compulsory attendance. The examination consists in a written test.* |
| **Próvdøming / Examination** | Uttanseturs.<br><br>*External* |
| **Próvtalsstigi / Marking scale** | 7-talsstigin<br><br>*The 7-Point Grading Scale* |
| **Lestrarlisti / Bibliography** | Umleið 200 síður at lesa av lógteksti, viðmerkingum, álitum, dómum, og greinum.<br><br>*Approximately 200 pages of legal text, observations, reports, court decisions and articles.* |
| **Ábyrgd / Contact** | Bárður Larsen. |